betri

# Arbeiðsskaði

**Øll, sum á ein ella annan hátt hava fólk í arbeiði, hava skyldu at tekna arbeiðsskaðatrygging. Henda skylda er ásett í lógini um arbeiðsskaða.**

Endamálið við arbeiðsskaðatryggingini er, at veita endurgjald til fólk, sum fáa skaða í sambandi við teirra arbeiði. Tryggingin veitir eisini endurgjald til avvarandi um ein doyr orsakað av einum óhappi i sambandi við arbeiði.

**Hvat er ein arbeiðsskaði**
Ein arbeiðsskaði er:
• Ein vanlukkutilburður, sum stendst av arbeiðinum ella av viðurskiftunum, sum arbeitt verður undir.
• stutttíðar árin av arbeiðinum ella av viðurskiftunum, sum arbeitt verður undir. Talan er um árin, sum vara í mesta lagi 5 dagar.
• brádliga hendir lyftiskaðar.

**Hvørjum er tryggingin ætlað**
Tryggingin er ætlað øllum føroyskum arbeiðsgevarum, sum hava fólk í arbeiði á føroyskum landøki, sjóøki ella loftrúmi. Arbeiðsgevarin hevur skyldu at tekna trygging uttan mun til, um arbeiði er fyribils ella støðugt. Tryggingin fevnir bæði um lønt og ólønt arbeiði.

Eisini eru hjúnafelagi, húsfólk og parteigari hjá tryggjaða tryggjað, um tey taka lut í arbeiðinum undir somu treytum sum onnur.

Harafturat er tryggingin ætlað:
• Sjálvstøðugt vinnurekandi, ið hava skyldu at tryggja seg sjálvan móti arbeiðsskaða við at tekna arbeiðsskaðatrygging.
• Føroyskum arbeiðsgevarum, ið senda fólk, sum eru búsitandi í Føroyum, uttanlands at arbeiða fyri seg í styttri tíðarskeið.
• Fólki, ið arbeiða fyri útlendskan arbeiðsgevara á føroyskum øki.

**Hvørji endurgjøld veitir tryggingin**
Tryggingin veitir endurgjald til:
• Útreiðslur til sjúkuviðgerð, útreiðslur til hjálpitól so sum brillur og protesur, uppvenjing v.m., meðan málið um endurgjald verður viðgjørt. Endurgjald verður bert veitt í tann mun heilsutrygd, tað almenna ella onnur ikki veita endurgjald.
• Dagpening undir málsviðgerðini. Tað er Almannastovan, sum í fyrstu atløgu veitir endurgjald.
• Mist vinnuføri. Um vanlukkutilburður hevur gjørt, at førleikin hjá tryggjaða at forvinna sær inntøku er minkaður meiri enn 15%, verður endurgjald fyri mist vinnuføri latið.
• Varandi mein. Hevur tryggjaði fingið eitt varandi mein, sum er 5% ella meir, fæst endurgjald fyri varandi mein.
• Skiftisveiting til eftirsitandi hjúnafelaga, sambúgva ella onnur, sum stóðu hinum deyða nær.
• Endurgjald fyri miss av uppihaldara. Um tryggjaði doyr fáa tey endurgjald, sum hava mist uppihaldaran. Bæði børn og vaksin kunnu fáa endurgjald.

**Tryggingin kann víðkast**
Arbeiðskaðatryggingin kann víðkast til eisini at vera galdandi á veg til arbeiðis og á veg heim frá arbeiði.

**Hvussu verður tryggingin teknað**
Tryggingin verður teknað við at venda sær til okkara. Fyri at tekna tryggingina er neyðugt at upplýsa okkum nágreiniliga, hvat slag av virksemi talan er um og hvussu nógv fólk eru í starvi.

Tryggingargjaldið verður ásett í mun til tal á starvsfólkum og hvat slag av virksemi talan er um.

**Broytingar**
Um so er, at broytingar eru í virkseminum eftir at tryggingin er teknað, skulu hesar broytingar fráboðast okkum. Talan kann eitt nú vera um at farið verður undir annað virksemi enn tað, ið er fráboðað okkum ella at talið á starvsfólkum broytist.

**Hvussu er tá skaði hendir**
Ein arbeiðskaði skal fráboðast okkum beinan vegin. Síðani tekur Vanlukkutryggingarráðið støðu til endurgjaldið.

**Vinnusjúkur**
Arbeiðsgevarar hava somuleiðis skyldu at tekna trygging móti vinnusjúkum. Upplýsingar um vinnusjúkur og vinnusjúkugrunnin eru á www.vsg.fo og á Vanlukkutryggingarráðnum www.fo.domstol.dk

**Fá meira at vita**
Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um hesa tryggingina. Vilt tú vita meira um arbeiðsskaðalógina og tryggingartreytirnar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum og fáa nærri vegleiðing frá einum av okkara ráðgevum.